Útgávukonsert:

# Páll Sólstein og Aldubáran

TÍÐINDASKRIV

Í samband við útgávu av nýggjari fløgu við Páll Sólstein og Aldubáruni verður útgávukonsert í Leikalund í Klaksvík, hóskvøldið 2. november.

Á fløguni eru 12 løg, sum Páll Sólstein hevur gjørt til yrkingar eftir Christian Matras, Jens Paula Heinesen, Steintór Rasmussen, T.N. Djurhuus, Hans A. Djurhuus og William Heinesen.

Luttakara á fløguni eru: Sang: Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen, og tónleikararnir eru úr Aldubáruni.

Fiól: Angelika Nielsen. Floyta: Andrea Heindriksdóttir. Fagott: Jógvan Zachariassen. Flygil: Stamen Stanchev. Flygilhorn/trompet. Ólavur Olsen. Flygil/Horn: Páll Sólstein. Trombone: Andras Olsen. Akk.guitar. Ólavur Jakobsen. El.guitar. Mikkjal Hvannastein. Ljómborð: Finnur Hansen. Akk. bass. Arnold Ludvig. Slagverk: Rógvi á Rógvi. Cello: Tóri Restorff Jacobsen,

Mastrað: Lennert Kjeldsen, Upptøkur: Finnur Hansen og Magni Huusgaard. Ljóðblandað: Finnur Hansen. Fløguhúsan gjørdi Edward Fuglø og tað er Tutl ið stendur fyri útgávuni. Sangirnir eru fyrr framførdir á konsertferð hjá Aldubáruni í Føroyum, Danmark og Norra.



Konsertin byrjar kl. 18.00 og varir í ein tíma. Ókeypis atgongd.



Kathrina Skarðsá Jeppesen:

# Listaframsýning í Ribarhúsi

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 26. oktober kl. 15 læt ein listaframsýning upp í Ribarhúsi í Fuglafirði. Tað er Kathrina Skarðsá Jeppesen, sum sýnir fram.

Á framsýningini eru oljumálningar og tekningar í mixed media. Motivini spenna víða, alt frá føroyskari náttúru til expressivar litaðar myndir og skapningar.

Hóast sín unga aldur hevur Kathrina Skarðsá Jeppesen (1984), ið hevur røtur úr Fuglafirði, teknað og málað í nógv ár. Hon hevur eitt árs útbúgvingar frá Designskúlanum í Kolding og eitt ár frá Kunsthistorier í Århus. Eitt stutt skifti hevur hon undirvíst á Den Skandinaviske Designhøjskole í Randers. Ætlanin er at fara víðari á Kunstakademiið komandi vár.

Av framsýningum hevur Kathrina umframt at sýna fram út á ungdómsframsýningum í Danmark, eisini havt framsýning í Ribarhúsi í desember mánað í fjør.

Framsýningin er opin fram til 8. november 2006 – hvønn dag millum kl. 15.00 og 17.30; leygardag eisini millum kl. 10.00 og 13.00.

# Sangfundir í samkomuhúsinum í Sumba

TÍÐINDASKRIV

Komandi vikuskiftið verða sangfundir í samkomuhúsinum í Sumba frá hóskvøldinum 2. nov. til sunnukvøldið 5. nov. Fundirnir verða hvørt kvøld kl. 20. Dentur verður lagdur á felagssangin við góðum tónleikarum úr Suðuroy.

Terji Nilssen úr Lopra og fleiri koma at hava ábyrgdina av tónleikinum. Leygarkvøldið kemur Suðuroyarkórið at syngja, sum verður stjórnað av John í Skemmuni. Eisini verða vitnisburðir og tala, har evangelistarnir Poul Jóhan Djurhuus og Svenning av Lofti koma at bera orðið fram. Í hesum sambandi verður farið í húsini í Sumba, Lopra og Økrum við eini innbjóðing, har eisini ein stuttur evangeliskur boðskapur er at lesa á innsíðuni. Eisini verða plakatir settar upp um alla oynna.




Fyrireikarnir siga, at øll eru hjartaliga vælkomin, og at teir vóna at síggja bæði ung og eldri í samkomuhúsinum í Sumba hesi kvøldini.

**Dagurin í morgin**

**November. Alla halganna dagur.** Longu í aðru øld var siður at halda minningardag hjá hvørjum einstøkum blóðvitni á deyðadegnum, men umleið ár 350 varð samtykt at halda minningardag fyri øll ein dag í árinum. Pávin Gregorius III ásetti í 731, at dagurin skuldi verða hildin 1. november. Løgtingið samtykti í 1949 at 1. november skuldi vera hildin sum minningardagur teirra sjólætnu.

# Olivur við Neyst í Leikalund

TÍÐINDASKRIV

Navnframi listamaðurin Olivur Við Neyst ferð allan november mánað at sýna fram sína list í Leikalund í Klaksvík.

Sjálvur kemur Olivur úr Klaksvík, har hann var føddur í 1953. Hann gekk á listaháskúlanum í Keypmannahavn í árunum 1975 - 1979. Olivur hevur haft eitt ótal av framsýningum bæði í Føroyum og uttanlands, og er sera væl umtóktur sum listamaður.

Á framsýningini í Leikalund, sýnir Olivur framm vatnlit og pastellmyndir. Hetta eru skitsur hann hevur arbeitt við úti í náttúruni. Myndaevnini eru norðanfjørðs og úr Finlandi, har hann var í 2001.





Framsýningin verður í Leikalund í Klaksvík frá 3. november og mánaðin út. Ferniseringin verður fríggjakvøldið 3. nov. Kl. 19. Leikalund hevur opið til kl. 23 hetta kvøldið.

